# ítróttur

Nr. 206 • fríggjadagur • 28. oktober 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


# Jógvan Martin og John taka landsliðið







*Tað verður Jógvan Martin Olsen, sum verður nýggjur A-landsliðsvenjari í fótbólti. Nýggjur hjálparvenjari verður John Petersen, meðan Jens Martin Knudsen heldur fram sum málmansvenjari*

**Enn eru boðini ikki váttað. Men tað skuldi verið púrasta vist. Jógvan Martin Olsen verður nýggjur landsliðsvenjari, og John Petersen verður nýggjur hjálparvenjari**

LANDSLIÐSVENJARI
*Jákup Mørk*

Hósmorgunin sendi Fótbóltssambandið út tíðindaskriv, har tíðindafundur varð fráboðaður. Tíðindafundurin verður í FSF-húsunum fríggjadagin kl. 10.30, og bara eitt punkt er á skránni. Nevnliga setan av nýggjum A-landsliðsvenjara.

### Føroysk loysn

Í Fótbóltssambandinum hava menn hesa seinastu tíðina verið óvanliga kúrrir, tá tosið um nýggjan landsliðsvenjara hevur stungið seg upp, og tað tykist eisini púrasta vónleyst at fáa nakra almenna váttan um, hvør nýggi venjarin verður.

Men tað skuldi kortini verið púrasta víst, at talan verður um eina føroyska loysn. Tá Henrik Larsen í síni tíð fekk boðini um, at hansara tíð í sessinum var um vera farin, skrivaðu vit, at nógv talaði fyri, at Jógvan Martin Olsen gjørdist nýggi maðurin í sessinum.

Sjálvur hevur Jógvan Martin ikki vilja gjørt viðmerkingar til hendan partin áður, og tað vil hann framvegis ikki. Men sambært okkara upplýsingum, so verður toftamaðurin nú høvuðsvenjar, eftir at hann í níggju ár hevur virkað sum hjálparvenjari á landsliðnum.

Og sambært tí, sum vit hava fingið at vita, so er navn eisini sett á, hvørjir næstu menninir hjá Jógvan Martini skulu verða. Jens Martin Knudsen hevur seinastu tíðina verið knýttur at venjarapartinum á landsliðnum sum málmansvenjari. Og seinasta dystin varð hetta eisini gjørt formelt, soleiðis at runavíkingurin stóð skrásettur sum málmansvenjari á dómaraseðlinum. Hann hevur eisini áður arbeitt saman við Jógvan Martin Olsen, og tað er alt, sum bendir á, at hetta samstarvið eisini fer at halda fram.

### John er jokarin

Tá løgtingsvalið var á skránni í januar mánaði, fekk John Johannesen leiklutin sum jokarin hjá javnaðarflokkinum.

Og tað ber væl til at tosa um jokara, tá hjálparvenjarin hjá A-landsliðnum nú verður settur. Og eisini her eitur jokarin John.

John Petersen skal nevnliga - eftir tí, sum vit hava skilt - vera nýggi hjálparvenjarin á landsliðnum. Hann hevur seinasta góða árið búleikast í Viborg, har unnustan er farin undir útbúgving. Men sum skilst, so eru útlit fyri, at úbúgvingin kann fullførast í Føroyum.

Eins og Jógvan Martin Olsen, so segði John Petersen seg ikki hava nakra viðmerking yvirhøvur, tá vit høvdu orðið á honum hósmorgunin. Og sum tað onkuntíð er støðafest, so er ein slík viðmerkingum í sjálvum sær munandi meira opin, enn um svarið var nei.

Tað er einki at ivast í, at valið av John Petersen kemur sera óvart á stóran part av teimum, sum hava fylgt landsliðnum. Men fyri tað er als ikki víst, at talan er um nakað vánaligt hugskot.

### Spælarans maður

Fyrst og fremst, so hevur John eitt stórt navn í føroyskum fótbólti. Hóast hann ikki hevur nomið sær nakrar serligar royndir sum venjari, so var hann sum spælari ein av teimum, sum við góða bóltførleikanum og ikki minst taktiska medvitinum kundi broyta dystargongdina í einum dysti. Sum persónuar er hann eisini typan, ið væl egnar seg til at læra frá sær. Í so máta er einki undur í, at hann valdi lærarastarvið, tá útbúgving skuldi veljast.

Og at enda, so vil hann heilt víst kunna vera eitt sera gott val sum bindiliður millum spælarar og venjara. Hann hevur í átta av teimum níggju árunum hjá Jógvan Martini verið ein týðandi partur av landsliðshópinum, og tí hevur hann hollan kunnleika til tað, sum nýggi landsliðsvenjarin stendur fyri. Hartil er hann eisini ein maður, sum hevur stórt álit millum verandi spælararnar.

Og hvør veit. Kanska kundi hann eisini verið maðurin, sum kundi lært landsliðsspælararnar at skjóta mál. Nakað sum helst hevur verið størsta einstaka mangulvøran á landsliðnum, hesa seinastu undankappingina.

# Hans Kristian vann í Klaksvík

**Sterki kollfirðingurin vann rímiliga trygt KBI-Open. Tveir ungir klaksvíkingar vórðu næstir í røðini**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Eins og í fjørheyst skipaðu klaksvíkingar herfyri fyri talvkapping í Skákinum á Akursmørk. Finnbjørn Vang vann ruddiliga seinasta ár.

Kappingin varð tíverri lýst nakað seint og helst varð hetta orsøkin til lága luttakaratalið, tíggju. Við høvuðsstuðli í rygginum vórðu góðir vinningar til fremstu telvararnar.

Hans Kristian Simonsen, ið mangan hevur verið greiður favorittur í eitt nú vikuskiftiskappingum í Havnini seinastu árini, er ikki bangin fyri at favorittrolluni. Hugurin til talv vinnur á óttanini fyri at missa rating. Soleiðis skal hugburðurin sjálvandi vera hjá øllum telvarum.

### Dragaberg royndist væl

Unglingaføroyameistarin úr Klaksvík, Røgvi Dragaberg, gav Hans Kristiani kapping. Talvið teirra millum í 3. umfari endaði javnt og tá manglaðu báðir teirra at telva ímóti hinum oddafiskunum, Finnbirni og Tummas Martini Anthoniussen. Alt kundi tí henda.

Hans Kristian helt høvdið kalt og vann á júst nevndu telvarunum. Og tá Røgvi tapti ímóti Rana Baldurssyni í fimta og seinasta umfari, varð greitt, at Hans Kristian vann árligu vikuskiftiskappingina í Klaksvík. Røgvi hevði í 4. umfari vunnið heldur óvæntað á Tummas Martini.

Við sigrinum á Røgva, endaði Rani saman við Røgva á deildum 2. plássi. Góð úrslit hjá lokalu ungu telvarunum, serliga hjá Røgva. Klaksvíkingar hava brúk fyri øllum góðum kreftum, nú felagið hevur tvey lið í 1. deild. Tí fegnast teir um vaksandi talvstyrkina hjá Røgva og Rana. Eisini Bogi Hansen er ein telvari í framgongd. Finnbjørn kann ikki vera nøgdur við trý stig og deilt triðja pláss. Men sum hann segði eftir kappingina, so var tað gott at sleppa at telva aftur. Hann brúkti kappingina einamest sum venjing til liðkappingina, ið byrjar 6. novembur.

Hans Kristian segði seg ikki vera í serliga góðum formi, hóast hann vann kappingina. Tó varð sigur hansara á Tummas Martin góður og vísti eisini munin millum føroyska elitutelving og telvarar undir 2000 í rating.

### Endaliga støðan

| | |
|---|---|
| Hans K. Simonsen (2264) | 4,5 stig av 5 |
| Rógvi Dragaberg (1602) | 3,5 |
| Rani Baldursson (1844) | 3,5 |
| Finnbjørn Vang (2098) | 3,0 |
| Bogi Hansen (1367) | 3,0 |
| Tummas M. Anthons. (1903) | 2,5 |
| Herborg Hansen (1278) | 2,0 |
| Vagn Heldarskarð (1453) | 2,0 |
| Dánjal P. Jacobsen (1220) | 1,0 |
| Klæmint Hansen (------) | 0,0 |

### Liðkappingin verður Elo-ratað

Nýggja nevndin í Talvsambandi Føroya, við Jógvani Joensen sum formanni, hevur gjørt av, at liðkappingin 2005-06 verður skrásett hjá FIDE. Fyrr hava úrslitini í heimligu liðkappingini bert ávirkað føroyska ratingtalið, men nú verður møguleiki at eisini betra um sítt altjóða ratingtal.

Liðkappingin byrjar sum kunnugt 6. novembur. Meira verður at frætta um liðini og favorittarnar í 1. deild í komandi talvteigi.